Eldrasambýli fyri minnisveik í Vøllulíð:

# Fyrstu bøkkarnir loystir

**Í august mánaða verður veruliga farið undir arbeiðið at byggja eitt eldrasambýli fyri minnisveik í Vøllulíð í Havn. Fyrrapartin í gjár loystu Jan Christiansen, borgarstjóri, Beate L. Samuelsen, formaður í sosialu nevnd og Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í Almannamálum fyrstu bøkkarnar**



*Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í Almannamálum, Beate L. Samuelsen, formaður í sosialu nevnd og Jan Christiansen, borgarstjóri, settu í gjár tveir teir fyrstu spakarnar og fyrsta hakan í jørðina til eldrasambýlið í Vøllulið. Sigast kann, at hakan eigur Páll á Reynatúgvu sjálvur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

ELDRASAMBÝLI
*Ingrid Bjarnastein*

Í ráliga veðrinum fyrrapartin í gjár var fitt av fólki samankomið í sambandi við, at fyrstu bøkkarnir til eldrasambýlið í Vøllulíð vóru loystir. Hetta er fyrsta sambýlið av sínum slag í Føroyum, og eru stigtakararnir fegnir um at vera komnir so langt.

Jan Christiansen, borgarstjóri, bjóðaði vælkomin, og síðani varð farið oman í bøin, har teir báðir spakarnir og tann eini hakin vórðu settir í jørðina. Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í Almannamálum, hevði tikið sín egna haka við, meðan Jan Christiansen og Beate L. Samuelsen brúktu tveir spildurnýggjar spakar úr Danmark.

– Eitt eldrasambýli fyri minnisveik hevur verið á skránni hjá býráðnum leingi, og nú eru vit endiliga komin so langt, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

– Eldraøkið er annars eitt landsmál, men av tí at tørvurin er so mikið stórur, hevur kommunan valt at gera nakað við málið, sjálvt um eldraøkið er eitt landsmál, og hervið verður eisini prógvað, at kommunan vil fegin verða við á hesum økinum. Kostnaðurin verður býttur 50-50 millum land og kommunu.



*Selmar Nielsen er arkitekturin aftanfyri eldrasambýlið. Her heldur hann modellinum av sambýlinum í hondini. Pláss verður fyri 16 búfólkum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Einkult

Arikteturin aftanfyri eldrasambýlið er Selmar Nielsen. Hann hevur lagt dent á, at gera bygningin so einkultan sum gjørligt, soleiðis, at tað verður lætt hjá búfólkunum at fáa skil á.

– Eg havi roynt at gera uppihaldsøkið so gott sum møguligt. Útsýnið er gott, og harafturat, so hevur kommunan lagt eina góða byggigrund fyri eldrasambýlið. Roynt er at fáa teir kvalitetir, byggiøkið hevur, fram, har útgangsstøðið eru tey krøv starvs- og búfólk seta, sigur Selmar Nielsen, arkitektur.

Eldrasambýlið er býtt sundur í tveir veingir, har pláss eru fyri átta búfólkum á hvørjum veingi. Sniðið er einkult – ongar gongir, har hvør hurðin úr tí einkulta rúminum, leiðir út í eitt felagsrúm. Útsýnið er gott – tann parturin, ið vendir móti Nólsoynni er gjørdur av glasi, og møguleiki er eisini at fara út á eina terassu, sum er hálvt dekkað, soleiðis, at sjálvt um veðrið er keðiligt, er ikki neyðugt at gerast vátur. Eisini er ítrivsrúm, og hvørt búfólki hevur ein lítlan tekøk.

– Fimm uppskot komu inn, og av hesum fimm varð hildið, at hetta var tað besta, segði Beate L. Samuelsen, formaður í sosialu nevnd.

– Hetta var ikki tað dýrasta, men heldur ikki tað bíligasta. Tosað hevur eisini verið um møguligar broytingar, men tá alt kom til alt, var uppruna uppskotið tað besta.

Eldrasambýlið í Vøllulíð skal verða liðugt í januar 2004. Byggikostnaðurin liggur um góðar 17 milliónir krónur. Setast skal ein upptøkunevnd, sum kemur at gera av, hvør sleppur inn á heimið.

# Bjargingarringur horvin

**Annar av bjargingarringunum, sum Reyði Krossur hevur sett upp í Sandágerði, er horvin. Ongin veit, hvat er vorðið av ringinum, og vil Reyði Krossur fegin fáa hendur á honum aftur**

BURTURMIST
*Ingrid Bjarnastein*



*Her er ein bjargingarringur horvin í Sandágerði. Ringurin hevur verið har í eitt gott ár, og hetta er fyrstu ferð, at nakað tílíkt er hent*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fyri einum góðum ári síðani setti Reyði Krossur tveir bjargingarringar upp í Sandágerði í Havn.

– Vit settu tveir ringar upp har, um tað skuldi borið so á, at onkur kom í neyð, og hevði tørv á einum bjargingarringi, sigur Súni Vinther, formaður í Reyða Krossi.

– Men nú er annar ringurin so horvin, og er hetta hent áðrenn vikuskiftið. Tann, ið plagar at halda eyguni við ringunum, hevur roynt at leita í nærumhvørvinum, men hevur ikki funnið hann nakrastaðni. Vit høvdu tí verið ógvuliga fegin um onkur veit um ringin at siga, segði okkum frá, tí so sleppa vit frá, at keypa ein nýggjan og seta hann upp.

So um nakar hevur borið eyga við ringin, ella møguliga er farin avstað við honum, verður viðkomandi biðin um at seta seg í samband við Reyða Kross.

Ein bjargingarringur av hesum slagnum kostar við uppsetan millum 6-800 krónur.

# Kalvabátarnir góðan fiskiskap í Íslandi

**- Kvotan verður helst uppfiskað, tá ið hesin mánaðin er hálvrunnin, sigur Jón Nolsøe Olsen, reiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Trý føroysk skip fiska kalva í íslendskum sjógvi. Tey eru Gullborgin og Fuglfirðingur, sum eru heimahoyrandi í Fuglafirði og Turid, sum er úr Klaksvík.

Skipini fóru úr Føroyum fyrst í juni, tá ið loyvt var at fiska kalva undir Íslandi. Samlaða kvotan er 80 tons av rundari vekt og 66 tons, tá ið kalvin er heysaður.

### Góður fiskiskapur

Jón Nolsøe Olsen sigur, at í byrjanini gekst ikki so væl hjá bátunum, men skjótt fekst væl av kalva, og í seinastuni hevur fiskiskapurin verið góður.

Sum skilst, hevur Fuglfirðingur, sum Andrias Johannesen førir, fingið størstu nøgdirnar. Herfyri høvdu teir fiskað 18 tons, og Jón metir, at teir nú hava fingið eini 22 tons av heysaðum kalva.

Jón veit eisini at siga, at Gullborgin landaði á Patriksfjørðinum seinast í farnu viku.

- Tað hevur gingið so væl hjá bátunum, at kvotan helst verður uppi, tá ið juli mánaði er hálvur, sigur Jón Nolsøe Olsen.



# Uttan ferðslupolitikk, ræður tilvildin

**- Føroyar eru ringast fyri av Norðurlondum, tá ið talan er um deyð og skadd í ferðsluni. Fáa vit ein orðaðan ferðslupolitikk, er møguleiki fyri at nógv viðurskifti kunnu verða bøtt, og vit kunnu av álvara arbeiða fram ímóti, at eingin verður dripin og ella fær skaða í ferðsluni, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

FERÐSLA
*Turið Kjølbro*



Ein langtíðar ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar hevur leingi staðið ovast á ynskilistanum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Hóast fleiri áheitanir á myndugleikar og umbønir til politikarar ígjøgnum fleiri ár, er ein slík ætlan ikki orðað enn. Hetta hevur Ráðið fyri Ferðslutrygd ikki hug at sláa seg til tols við og er tí av sínum eintingum farið í holt við at gera uppskot um ein føroyskan ferðslupolitikk. Stovnar og myndugleikar, ið hava við ferðslu og samferðslu í Føroyum at gera, verða hoyrd í sambandi við hetta arbeiðið, fyri at álitið skal verða so fullfíggjað, sum til ber. Arbeiðið er komið væl áleiðis, og miðað verður eftir at leggja tað fyri ein eykaráðsfund hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd seinni í ár. Síðani er ætlanin, at álitið verður handað myndugleikum og politikarum, og almenningurin verður kunnaður. Ráðið fyri Ferðslutrygd vónar, at landsins politisku myndugleikar taka væl ímóti uppskotinum, so væl, at tað kann liggja til grund fyri einum aðalorðaskifti í løgtinginum.

- Endamálið hjá okkum er at fáa ein orðaðan ferðslutrygdarpolitikk. Áðrenn vit fáa ein slíkan, ber illa til at seta nøkur mál. Sum er leita vit okkum mangan fram í blindum. Sum dømi kann verða nevnt, at hvørja ferð ein álvarslig ferðsluvanlukka hendir, er alt á gosi, øll skelkað og kjakið gongur heitt í einar tvær vikur. So er alt gloymt aftur. Mangan er hetta kjakið ov nógv merkt av kenslum, og vandin fyri at skeivar niðurstøður verða gjørdar, er stórur. Hava vit harafturímóti ein væl umhugsaðan ferðslutrygdarpolitikk, er møguleiki fyri at vit halda okkum á einari skilagóðari kós, og at kjakið fyriheldur seg til niðurstøður, sum eru grundaðar á hagtøl og óheftar fakligar metingar. Ein orðaður ferðslutrygdarpolitikkur skal hinvegin ikki vera meira fastlagdur enn so, enn at tað ber til at koma til nýggjar niðurstøður, um nýggj vitan kemur fram ella at fyritreytirnar broytast, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

### Ikki áhugavert evni

Hví tað ikki hevur eins stóran áhuga og skund millum politikarar og politisku fyrisitingina at fáa ein orðaðan ferðslupolitikk, sum at fáa orðað politikk fyri onnur øki í samfelagnum, sigur Jón Kragesteen, at tað helst lutvíst hevur nakað at gera við, at umsitingin ikki er so stór og lutvíst, at so nógv onnur mál troka á. - Hóast allar orsøkir skuldu verið til tað, vísa ferðsla og ferðslutrygd seg ikki at vera eitt heitt politiskt evni, sum upptekur politikarar. Tað er ikki nóg áhugavert at brúka í einum valstríði eitt nú. Uppgávan hjá Ráðnum er tí at sannføra politikarar og myndugleikar um, hvussu umráðandi tað er at fáa ein ferðslupolitikk.

Og ikki kann sigast annað enn, at tølini tala fyri seg: seinastu tíggju árini eru 39 føroyingar deyðir í ferðsluni, og mett verður, at einir 1000 hava fingið skaða, og av hesum um 100, sum hava fingið varðandi mein. Í veruleikanum er talan um ein sera stóran miss fyri samfelagið. Verður altjóða framferðarháttur nýttur til at rokna út, hvussu stórur missurin er, koma vit fram til stór tøl, nevniliga, at ferðsluvanlukkur og ferðsluóhapp hava kostað føroyska samfelagnum hálva aðru milliard seinastu tíggju árini. Men hóast hesi tøl ber illa til at seta talvirði á sorg og sakn hjá teimum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis verða rakt av ferðsluvanlukku.

Ein veruleiki er, at uttan mun til, hvat ið gjørt verður, og hvør ferðslupolitikkur verður førdur, so fara ferðsluvanlukkur og ferðsluóhapp at henda.

- Vit menniskju eru einaferð soleiðis skapt, at vit gera mistøk og tað fara vit í framtíðini eisini at gera. Endamálið við ferðslutrygdararbeiðinum má tí vera, at skipa fyri, at mistøkini ikki hava so álvarsligar avleiðingar við sær, sigur Jón Kragesteen.

- Skal hugburðurin hjá fólki broytast til dømis viðvíkjandi trygdarbelti, má ein ætlan fyriliggja, og tað kann eitt nú vera at leggja størri orku og dent á upplýsing og undirvísing, sigur Jón Kragesteen, sum leggur afturat, at onnur lond, sum hava orðaðan ferðslupolitikk hava betri úrslit at vísa á enn vit og eina betri ferðslutilvitan.

- Føroyar eru saman við Danmark ringast fyri av Norðurlondum, tá ið talan er um deyð og skadd í ferðsluni. Er eingin ferðslupolitikkur, ræður tilvildin. Fáa vit ein orðaðan ferðslupolitikk, er møguleiki fyri, at nógv viðurskifti kunnu verða bøtt, er Jón Kragesteen sannførdur um.

### Lýsing og tilmæli

Uppskotið, sum starvsnevndin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd hevur sett sær fyri at evna til, og sum starvsnevndarformaðurin Petur Jacob Sigvardsen og dagligi leiðarin, Jón Kragesteen hava fingið til uppgávu at skriva, lýsir ferðsluviðurskiftini í Føroyum og hevur uppskot um ábøtur. Í álitinum eru eisini uppskot um raðfesting av teimum tiltøkum, sum mælt verða til at seta í verk, og hvat er mest neyðugt og skilabest at gera. - Álitið er í samsvari við nullhugsjónina, hvørs endamál er, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligan skaða í ferðsluni. Tað eru fimm viðurskifti, vit kunnu ávirka: bilurin, vegurin, lógarverkið, eftirlitið og so sjálvsagt menniskjað. Sum oftast mugu vit inn á fleiri av hesum viðurskiftum samstundis, tá ið tiltøk verða gjørd. Sum dømi um hetta kann verða nevnt, at bilurin var betraður við, at bilbelti vóru sett í hann. Roynt var so at upplýsa um fyrimunirnar við bilbeltinum, men ikki fyrr enn tað við lóg var ásett, at bilbeltið skuldi verða nýtt, fóru fólk at nýta tað. Men ein lóg er ikki nóg mikið, neyðugt er eisini við góðum eftirliti, so her má løgreglan støðugt gera sín part. Harumframt vísa royndirnar, at hóast lóg og eftirlit, er neyðugt áhaldandi at upplýsa um tað neyðuga við bilbeltinum. Øll lond, sum hava sett sum lógarkrav, at bilbelti skal verða nýtt, hava upplivað, at talið á deyðum og álvarsliga skaddum hevur minkað beinanvegin, lógin varð sett i gildi, sigur Jón Kragesteen at enda.

*- Tølini tala fyri seg: seinastu tíggju árini eru 39 føroyingar deyðir í ferðsluni, og mett verður, at einir 1000 hava fingið skaða, og av hesum um 100, sum hava fingið varðandi mein. Í veruleikanum er talan um ein sera stóran miss fyri samfelagið*




## 240 fólk farin í ferðsluni

Síðani 1928, tá ið fyrsta ferðsluvanlukkan var í Føroyum, eru 240 fólk deyð í ferðsluni. Hetta svarar til eina miðalbygd í Føroyum. Nógv tey flestu, sum eru deyð, eru menn, nevniliga 167, meðan 73 eru kvinnur. Í 1975 og í 1987 doyðu 14 fólk í ferðsluni. Onnur ár eru 10 fólk deyð. Seinnu árini hevur talið ligið í miðal 4-7 um árið, í fjør 4 og higartil í ár er eitt fólk farið. Í áttatiárunum øktist talið á akførum í Føroyum og talið á álvarsligum ferðsluvanlukkum, har nógv fólk doyðu, øktist samsvarandi. Hendan gongdin við samsvari millum tal av bilum og ferðsluandlátum hevur ikki verið so týðilig í nítiárunum. Økt trygd á vegunum, kravt bilbelti, og betri bilar eru ivaleyst orsøkin.

## Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni

Sunnudagin komandi verður á triðja sinni minningardagur teirra deyðu í ferðsluni hildin í Føroyum. Hendan dagin minnast vit tey mongu, sum eru farin í ferðsluni í Føroyum, og fólk leggja blómur á støð, har fólk eru deyð í ferðsluni. Í hesum sambandi fara vit í vikuni at gera eitt sindur burturúr ferðsluni, eitt nú við samrøðum við fólk, sum hava mist í ferðsluni, fólk sum eru komin til skaða í ferðsluni og foreldur, hvørs barn hevur verið við í stórari ferðsluvanlukku.